## Leita eftir drápsmanni



Í Svøríki hevur Ríkisdagurin samtykt eina lógarbroyting, sum ger tað møguligt hjá løgregluni at halda fram við at leita eftir manninum, sum myrdi forsætisráðharran Olof Palme í 1986. Eftir teirri gomlu lógini skuldi løgreglan gevast við kanningunum 25 ár aftan á drápið. Tann 28. februat næsta ár verða 25 ár, síðani Palme varð myrdur, og tí hevur Ríkisdagurin samtykt at broyta lógina, skrivar TT. Christer Petterson bleiv dømdur fyri at hava myrt Olof Palme, men hann bleiv fríkendur seinni. Christer Petterson doyði í 2004.

## Evropa vil hava vindorku

Tey seinastu árini hava støðugt fleiri lond í Evropa lagt seg eftir at seta upp vindmyllur heldur enn at byggja nýggj kol- ella kjarnorkuverk. Hendan gongdin sæst eisini aftur í tølunum. Evropeiski vindorkufelagsskapurin, sum eitur Ewea, sigur, at 39 prosent av orkuni, sum bleiv tikin í nýtslu í fjør, kom frá vindmyllum. Á teimum báðum næstu plássunum komu ávikavist gass og sólorka. Hinvegin kom minni orka frá kol- og kjarnorkuverkum. Tað eru serliga vindmyllur á sjónum, sum hava stóran áhuga. Tað er heldur ikki so løgið, tí tær framleiða 40 prosent meiri orku enn vindmyllur á landi, sigur Ewea.

# Keypari er til Ros

**Fyri einum ári síðan boðaði eitt reiðarí í Litava frá, at tað var áhugað at keypa russiska trolaran Ros, sum í tvey ár hevur ligið í Kollafirði. Einki er hent, tí fútin vil hava greiði á, hvør eigur skipið**

RUSSAR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Trolarin Ros hevur ligið í Kollafirði í næstan tvey ár. Fútin rindar føstu útreiðslurnar fyri skipið, og Hjálpin føðir menninar umborð*

Tað gongur ógvuliga seint hjá fútanum at fáa ekspedera russiska trolaran Ros av landinum. Ros hevur ligið á Kollafirði í skjótt tvey ár. Har kom hann at liggja, eftir at fútin hevði gjørt arrest í skipinum. Nakað seinni fór reiðaríð á húsagang.

Eitt er, at tað kostar ríkiskassanum nógv at hava skipið liggjandi, og teir tríggir russararnir umborð liva av náði. Men skipið spøkir eisini í samráðingunum millum Føroyar og Russland og nervar harvið samstarvið landanna millum.

Finn Ougaard, varafúti sigur, at hann av øllum alvi roynir at finna útav, hvør í grundini eigur skipið. Hann vil hava at vita, um tað finst nakað trotabúgv hjá skipinum í Russlandi.

- Vit vildu fegin selt skipið, men vit mugu fyrst tryggja okkum, at ikki onkur ókend skuld hongur uppií búnum, sigur Finn Ougaard, sum leggur aftrat, at øll eru áhugað í at fáa skipið úr Føroyum.

### Dýrur gestur

Tað er dýrt fyri ríkiskassan, at Ros liggur í Kollafirði.

- Vit noyðast at gjalda streym og havnagjald, tí fútin hevur skipið í varðveitslu. Útreiðslurnar eru millum 30.000 krónur og 40.000 krónur um mánaðin, sigur Finn Ougaard.

Higartil hava útreiðslurnar hjá fútanum verið yvir eina millión krónur, tí mánaðarligu útreiðslurnar vóru fyrstu tíðina hægri enn nú.

Orsøkin til at skipið hevur ligið so leingi er, at fútin hevur bíðað eftir, at onkur eigari fór at gera vart við seg, sigur Finn Ougaard, sum veit, at í Noregi liggja fleiri russisk skip, ið eingin kenst við.

Árni Dam, russiskur agentur í Føroyum skilir als ikki, hví hetta málið skal hava drigið so nógv út.

### Hevur keypara

- Eg fann ein keypara fyri einum ári síðan gjøgnum ein agent í Keypmannahavn, vegna ett reiðari í Klaipeda í Litava. Hesum havi eg boðað frá, men einki er hent. Eg havi sett meg í samband við áhugaða keyparan aftur, og hann stendur framvegis við sítt boð, sigur Árni Dam.

Hann heldur, at hetta hevði verið besta loysin, tí hesin keyparin er til reiðar at seta skipið í stand, so tað kann sigla, útvega skipinum siglingarloyvi og senda fólk til Føroya eftir tí.

Menninir umborð fáa mat frá Hjálpini, og tað eigur Leif Erik Niclasen stóra takk fyri, sigur Árni Dam, sum gjøgnum fyritøku sína Faroe Agency eisini hevur hjálpt monnunum eitt við at givið teimum olju.

- Eg havi biðið um fund við fútan, tí vit kunnu ikki liva við, at skipið verður liggjandi her. Tað pínir alt samfelagið, sigur Árni Dam.

# Lønir og skattir góða byrjan í ár

**Tekin eru um vøkstur í privatu vinnuni, heldur Fíggjarmálaráðið**

*Tíðindaskriv*

Nú fyrsti mánaðin er farin av 2010, kann staðfestast, at januar í ár hevur verið tann besti januar mánaðin seinastu fýra árini, tá tað snýr seg um lønar og skattgjaldingar. Í januar í ár vóru goldnar 609 mió. kr. í lønum umvegis a-skattaskipanina, landsskatturin var góðar 109 mió. kr. og kommunuskatturin var góðar 100 mió. kr.

Tað kann sjálvandi tykjast løgið, at lønargjaldingarnar eru hægri, samstundis sum arbeiðsloysið er vaksandi. Nakrar av forkláringunum eru, at tey arbeiðsleysu nú verða væl loftaði av arbeiðsloysisskipanini. Tí minkar inntøkan hjá teimum, ið gerast arbeiðsleys, ikki altíð so nógv. Tað, sum hevur fingið samlaða lønarmassan at vaksa, eru betri fiskaprísir og sáttmálahækkingar. Í januar í ár hava fiskaprísirnir verið væl betri enn í januar í fjør, tí eru hýrirnar eisini hægri, samstundis sum sáttmálalønirnar eru hækkaðar seinasta árið. Enn er bert talan um fyrsta mánaðin av 2010, tí skulu tølini sjálvandi takast við fyrivarni.

Hóast innflutningurin framvegis er minkandi, eru tekin um vøkstur í privatu nýtsluni. Meirvirðisgjaldsinntøkur landskassans eru tær somu sum í januar í fjør, men inntøkurnar av skrásetingargjaldi av bilum eru nógv størri fyrsta mánaðin í ár samanborið við somu tíð í fjør.

